

*Lagaligar løtur vóru ikki nógvar hjá einum manni sum var mynstraður yvir 300 dagar um árið í eitt 15 ára skeið frá 1958 til 1964. Her er ein mynd á trolaradekki og ein á ferð uttanlands saman við konuni.*

## Myndir til ævisøguna um Kaj

Onnur bókin, í ævisøguni um Kaj Johannesen úr Hvannasundi, verður nú skrivað, og kemur, um alt gongur eftir vild, út í heyst. Hon fer serliga at snúgva seg um krígsárini við Skálabergi og Nærabergi. Tíðina umborð á Dragabergi, Sjúrðarbergi og týska Skálabergi.

Í hesum sambandi sóknast høvundurin eftir myndum frá æviskeiði hansara. Í fyrstu atløgu hava allar myndir, sum hava nakað við virki og lív hansara áhuga. Tað verið seg myndir umborð á skipi, ikki bara myndir av Kaj, men eisini av lívinum umborð. Myndir av monnum, sum sigldu við Kaj hava áhuga og eisini myndir umborð á trolarum, sum brøður hansara førdu. Eg havi eisini áhuga fyri myndum tiknum umborð á øðrum trolarum, av føroyskum trolarum undir fiskiskapi. Gerandismyndir av arbeiðsgevaranum hjá Kaj, J. F. Kjølbro, hava stóran áhuga.

Liggja tit inni við slíkum myndum, so hevði eg verið ógvuliga fegin, um tit settu tykkum í samband við meg.

**vinarliga**
Jústinus Leivsson Eidesgaard,
*rithøvundur*

**Forlagið Hellurnar**
v/Jústinus Leivsson Eidesgaard
Ovaragøta 1 · 188 Hoyvík
Tel. 22 31 43 · justinus@post.olivant.fo

**KAJ2**
Ein dokumentarisk ævisøga

FØROYAPRENT · TEL. 314 555


# STUBBIN
## í Kvívík

rullar til Vestmanna á bátastevnu




**Opið er:**
Hósdagin til kl. 20.00
Frí- og ley kl. 09.00 - 20.00

STUBBIN
í Kvívík
tel. 421 805
www.stubbin.fo


# Starvslýsingar á www.portal.fo

## Kostnaður: (um lýsingin eisini er í Sosialinum)

| | |
|---|---|
| 1 vika | kr. 500,- |
| 2 vikur | kr. 750,- |
| til freistin at søkja er úti: | kr. 1.000,- |

## Kostnaður: (um lýsingin ikki er í Sosialinum)

| | |
|---|---|
| 1 vika | kr. 750,- |
| 2 vikur | kr. 1.000,- |
| til freistin at søkja er úti: | kr. 1.250,- |

**2 lýsingar = -20% í avslláttri**
**3 ella fleiri = -30% í avslláttri**

# Miðvágs-Sandavágs skúli

Vegna farloyvi, lækkað tímatal, avlopstímar og næmingar við serligum tørvi verða hesi lærarastørv lýst leys at søkja.

**Tíðaravmarkað til skúlaárið 2005/2006:**

- 1 fulltíðarstarv (umsøkjari, ið kann undirvísa í ítrótti/svimjing dreingir hevur fyirmun).
- 1 fulltíðarstarv.
- 1 starv sum sergreinalærari 6 t/v at undirvísa í motorlæru.
- 1 starv sum sergreinalærari 4 t/v at undirvísa í sjóvinnu.

**Størvini verða lønt sambært sáttmála millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið.**

- 1 starv sum stuðul 15 t/v.

**Starvið verður lønt sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Fíggjarmálaráðið.**

Nærri fæst at vita um størvini frá skúlastjóranum á tlf. 332820 ella 218820.

Umsóknir skulu vera skúlastýrinum í hendi í seinasta lagi mánadagin 6. juni 2005.

**Skúlastýrið fyri Miðvágs-Sandavágs skúla**
V/Bjørn Akselsen
Hammersheimbsvegur 20
FO 360 Sandavágur

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

**Skrásetingar-nr. P/F 3888,** P/F 7. desembur 2004, 100 Tórshavn.
**Strikingardagf:** Felagið er strikað úr partafelagsskránni 19.05.2005
**Strikingarorsøk:** Felagið er strikað eftir samanlegging við skrásetingar-nr. P/F 1001, P/F Hotel Hafnia.

Skráseting Føroya
tann 19. mai 2005

Kristin Balle

---

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

**Skrásetingar-nr. P/F 1001,** P/F Hotel Hafnia, 110 Tórshavn.
**Viðtøkur broyttar:** 12.03.2005
**Partapeningur:** Hækking við kr. 6.175.000,00 til kr. 7.000.000,00
**Inngjaldingarháttur:** Kr. 6.175.000,00 í samband við fusión við P/F 3888, P/F 7. desember 2004.

Skráseting Føroya
tann 19. mai 2005

Kristin Balle